VÍF-KÍF 31-23 (12-10):

# VÍF setir ferð á

**Meðan sambiðlarnir í oddinum sýndu veikleikar, lótu vestmenningar ongan iva vera, tá teir vunnu stórsigur á KÍF**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Úrslitini higartil í endaspælinum hava til tíðir verið merkisverd, og eisini VÍF hevur verið partur av hesum, tá teir fyri hálvari aðru viku síðani taptu móti H71.

Mikudagin leiktu vestmenningar móti KÍF, og í øllum førum tykist tað nú, sum um teir hava lært av sínum mistøkum. Í øllum førum lótu teir ongan iva vera eftir, tá KÍF vitjaði.

Fyrra hálvleik sluppu kollfirðingarnir so dánt at spæla við, men tá kanónirnar vórðu koyrdar fram í seinna hálvleiki, var liðugt. Ikki minst man tað kennast hugaligt, at Áki Olsen nú aftur tykist førur fyri at spæla, samstundis sum Daniel Rápa og Áki G. Olsen halda fram við taktunum, sum í ár hava gjørt teir til nakrar av avgjørdu lyklaleikarunum hjá VÍF.

Hjá KÍF var Damir Oros enn einaferð stóri málslúkurin, men spæli hjá KÍF tykist tó í ov stóran mun vera bygt kring stóra jugoslavan, og tó at hann megnar nógv, so fær hann ikki einsamallur skotið sigrarnar heim. Har má størri ábyrgd flytast yvir á aðrar herðar, og tær ferðirnar, at viðleikarar hansara hava prógvað, at hetta ber til, hevur KÍF eisini verið munandi størri biti hjá mótstøðuni, enn teir vóru tað mikukvøldið.

### Dysturin í tølum

VÍF-KÍF 31-23 (12-10)
Málskjúttar:
VÍF: Áki Olsen 10(1), Daniel Rápa 6(1), Áki G. Olsen 4, Ólavur Brimnes 4, Agnar Joensen 3, Johnny Joensen 2, Ingi Olsen 2
KÍF: Damir Oros 10, Vagnur Johannesen 5(1), Petur Martin Poulsen 2, Regin Petersen 2, Mirko Milenkvic 1, Kristjan Madsen 1, Finn Heri Johannesen 1, Jákup Dam 1(1)
Brotskøst: VÍF 3, KÍF 5
Útvísingar: VÍF 6, KÍF 6
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johanen & Sámal Hansen.

Neistin-Tjaldur 27-27 (17-14):

# Neistin snávaði aftur

**Næsta stigatapið móti á pappírinum munandi veikari liði setir spurnartekin við, í hvønn mun Neistin er at rokna sum avbjóðari í oddinum**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tað mundi koma illa við hjá Neistanum, at teir bert fingu eitt stig burturúr, tá Tjaldur vitjaði*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Hondbóltskappingin í ár hevur boðið upp á fleiri óvæntað úrslit, og mikukvøldið kom enn eitt í røðini, tá Tjaldur megnaði at taka annað stigið við sær úr Havnini, har teir vitjaðu Neistan.

Undan dystinum var Neistin ájavn VÍF á fremsta plássinum, meðan Tjaldur var púrasta einsamalt í botninum, og tí mundu fá ivast í, at her skuldi gerast talan um tryggan sigur til heimaliðið.

Tjaldur hevur tó áður víst, at teir kunnu gera ein vørr. Millum annað vunnu teir útidystin á StÍF í grundspælinum, og nú gekk tað so útyvir Neistan.

Sum skilst, so var talan ongantíð um tað stóra leikliga upplivilsi á Hálsi mikukvølidið. Lítil ferð og nógv rótan stóð ovarlaga á dagsskránni, men spenningurin á máltalvuni helt sær tó alla tíðina.

Eftir at Tjaldur hevði fingið betru byrjanina, tók Neistin yvir eitt skifti, men gestirnir vildu ongan tíð sleppa takinum. Fleiri ferðir royndi heimaliðið at skrykkja seg leyst, men hetta eydnaðist ongantíð, og fram móti endanum var tað meira so, at Tjaldur var frammanfyri.

Javnleikur gjørdist tó endaliga úrslitið, og fyrst og fremst setir hetta kanska spurnartekin við, í hvønn mun teir bláu eru førir fyri at fylgja við í oddinum. Enn er munurin at kalla eingin millum StÍF, VÍF og Neistan, men stigamissis móti ávíkavist H71 og Tjaldri eru í øllum førum ikki tað, sum roknað verður við av einum oddaliði.

### Dysturin í tølum

Neistin-Tjaldur 27-27 (17-14)
Málskjúttar:
Neistin: Ragnar Stakksund 7, Jón Ludvig 6, Áki Mørk 6(2), Kári Mortensen 4, Helgi Justinussen 3, Morgan Knezevic 1
Tjaldur: Sverri Justinussen 9, Dragisa Stojovic 7(1), Zoran Sarcevic 4, Arnfinn Langgaard 3, Mortan Hansen 3, Tórhallur Thomsen 1
Brotskøst: Neistin 2, Tjaldur 2
Útvísingar: Neistin 4, Tjaldur 1
Dómarar úr Kyndli: Eyðun Samuelsen & Hannis Wardum.

SÍ - ÍF:

# Endurtøka

**Í fjør vann SÍ tryggan finalusigur á ÍF, men í ár mugu fuglfirðingar roknast sum favorittar**

MANSFINALAN
*Tíðindaskriv*

Aftur í ár verða tað SÍ og ÍF sum bresta saman í steypafinaluni hjá monnum. Í fjørð vann SÍ ein tryggan sigur, men sum úrslitini hava verið higartil í ár, má metast, at tað er ÍF, sum hevur tey betru kortini leygardagin.

ÍF hevur vunnið allar landskappingardystirnar higartil í ár á SÍ, og liðið liggur á odda í landskappingini. Men ikki hevur gingið eftir bókini í tveimum av teimum seinastu trimum dystunum, tí ÍF tapti bæði ímóti Fram og Mjølni.

Og júst SÍ vann á Mjølni seinasta vikuskifti, so útlit eru fyri eini spennandi mansfinalu.

### IF hægri og flest landsdystir

Miðalhæddin á ÍF liðnum er 186 cm, meðan miðalhæddin á SÍ liðnum er 184 cm, men tað er SÍ sum hevur tann longsta leikaran, sum er Raiko Petrovic við sínum 201 cm, og sum samstundis er longsti flogbóltsleikari her heima.

Eisini í landsdystum pr. leikara er ÍF betri fyri við sínum 9,8 pr. leikara ímóti 8,3 hjá SÍ. Men aftur her er tað SÍ, sum hevur toppskoraran, og er tað Suni Hansen við sínum 64 landsdystum fyri Føroyar.

Á SÍ liðnum eru tað tríggir sum hava leikt landsdystir, meðan ÍF liðið kann sigast at hava meira royndir á hesum økinum, við tað at heili 5 leikarar hava luttikið í altjóða dysti, og kann hetta kanska fáa ein týdning í avgerandi løtunum í Høllini á Hálsi, undir stórum trýsti frá áskoðarunum.

### SÍ hægri miðalaldur

Miðalaldurin hjá SÍ er 25,2 ár, meðan hesin hjá ÍF er 23,6 ár. Elstu leikararnir á báðum liðunum eru 39 ár, og eisini hava yngstu leikararnir á liðunum sama aldur — nevniliga 17 ár.

### Ein og tveir útlendingar

Bæði liðini hava útlendska styrk á liðnum. Á ÍF liðnum leikar Boban Ilic, sum eisini er venjari. Hetta er triðja árið at hann er við ÍF liðnum, og er tað undir leiðslu av honum, at ÍF gjørdist steypavinnari í 2001.

Tvíbróður hansara Borco Ilic leikar við SÍ, og SÍ hevur eisini ein annan útlending á liðnum, sum eisini er venjari, Rajko Petrovic.

Allir hesir fáa nokk ein avgerandi leiklut leygardagin, men tað verða eisini føroyskir leikarar sum koma at bíta frá sær.

### Nýggjar skógvar og styrk úr Danmark

Í fjørð stillaði Suni Hansen teir gomlu skógvarnar, men sum skilst, hevur SÍ keypt honum einar nýggjar, og hevur fingið henda kemparan aftur á vøllin. Við leikbyrjan í ár fór eisini ein av stuðlunum frá í fjørð Jón Falkvard uttanlanda í lestrarørindum, men hann hevur vant miðvíst seinast tíðini í Danmark, og eisini hann verður við leygardagin. Hetta kann verða við til at hjálpa SÍ til nøkur avgerandi stig í finaluni.

Og ársins stjørnuskot frá 2002, Jóhan Petur á Stongunum er við á SÍ liðnum.

### Rúni Weihe — fyrrverandi dómari

Og í ár eydnaðist tað. Ein av Føroya evnaríkastu leikarum, sum undanfarnu finalur hevur verið noyddur at staðið við floytuni í hondini og dømt, sleppur nú at royna seg í eini steypafinalu. Maðurin er Rúni Weihe, sum fyrr í ár gjørdi eina roynd at gerast yrkisleikari uttanlanda, fór við kappingarbyrjan til ÍF at leika frá Fram.

Hann hevur verið ein av berandi kreftunum á føroyska landsliðnum, og hansara leiklutur fer ikki at liggja eftir leygardagin.

Men á ÍF liðnum eru eisini aðrir kendir leikarar sum taktikarin Odd Eliasen, sum leikar hevari, hartsláandi bróðurin Bartal Eliasen, Kennet Neshamar og Jan Áki Olsen v.fl.

### Meting um úrslitið - Quick-poll kanning

Á heimasíðuni hjá FBF (www.fbf.fo) er ein quick-poll kanning, og á henni verður tippað, at tað verður ÍF, sum vinnur finaluna - 55 % ímóti 45 % (um kvøldið 12. februar.)

Men ein steypafinala er ein finala, og dysturin skal avgerast.




# Citroën Xsara



Um eingin bilur er í býti
fáa tygum ***ókeypis:***
4 sportfelgur
4 lamell-/píkadekk
1 komplett Dinitrol
rustviðgerð
***- ella ein góðan avsláttur***

**Prestige 1,6I 16V 110HK**
***Prestige útgerð***
6 airbags, aircondition, el-spegl v/hita,
veloursetur, hita í setrum framman,
fløguspælari v/6 hátalarum, tónaðar
rútar, fjarðstýrt sentrallás, tokulyktir framman

**171.000,-**

**Elegance 2,0HDI 110HK**
***Elegance útgerð, umframt Prestige***
Regnsensorar í forrútinum,
síðuspegl, ið kunnu leggjast inn at síðuni,
board teldu, leður róður

**195.000,-**

**Avmarkað nøgd**

*Vælkomin til*

CITROËN
***Ivan Johansen Bilar***
***www.ivan.fo***

FØROYA PEDAGOG FELAG

**Limafundur fyri leiðarar**

Mogens Seider, næstform. og Vagn Michelsen frá SL skipað fyri fundi fyri allar leiðarar við evninum: **Lederne og fagforening**

**á Hotel Hafnia 21. febr. 03 kl. 9.30-11.30.**

**Føroya Pedagogfelag**

**Frá S&K-felagnum**

Ársaðalfundur felagsins verður á Hotel Hafnia, Tórshavn

**leygardagin 15. februar 2003, kl. 16.00**

við hesi dagsskrá:

1. Frásøgn formansins frá farna ári
2. Roknskapur til góðkenningar
3. Val av trimum nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
4. Kunning um eftirlønarskipan
5. Innkomin uppskot
6. Ymiskt

Eftir fundin bjóðar felagið natturða.

SK **Nevndin**

FA. GRAVSTEINAR




Opið: m nadag - fr ggjadag 9[00]-17[00]
annars samb rt avtalu.

V¿ruskr kann f ast!

Sj nband - 31 77 74

**Hugnaløta og aðalfundur hjá blóðgevarum**

verður tórskvøldið 20. febr. kl. 20 í hølunum hjá Naddoddi á Tvøroyri.

Aðalfundurin verður samb. lógini. Eftir fundin verður hugnaløta við heitum drýli og drekkamunni. Marita Simonsen úr Havn luttekur.

**Blóðgevarar í Suðuroy**




**Til Sølu**

**Grundøki í Klaksvík**

Grundøki Garðavegur 5, stórt 500 m², liggur sera væl fyri mitt í býnum, til sølu til hægstbjóðandi.

**Tlf. 45 76 55 ella 21 73 55**

Sosialurin -tað loysir seg